# HM2010 SUÐ

# Afrikanska vónin

**HM2010** Ghana er einasta av afrikansku londunum, sum er eftir, og í fjórðingsfinaluni skal liðið møta Uruguay, ið vann seg víðari við einum perlumáli frá Luis Suárez

Hilmar Jan Hansen

Ghana helt leygarkvøldið lív í dreyminum um at vinna HM-gull í sínum egna heimsparti, tá tað eftir longda leiktíð eydnaðist at vinna 2-1 á USA. Sostatt er Ghana einasta afrikanska landið, sum er eftir í kappingini, og í fjórðingsfinaluni skal Ghana spæla ímóti Uruguay.

Í áttandapartsfinaluni ímóti USA fekk Ghana eina dreymabyrjan við máli longu í fimta minutti, men mitt í seinna hálvleiki javnaði USA. Henda støðan helt sær dystin út, og tí máttu liðini spæla tvær ferðir eitt korter aftrat, og tá skoraði Gyan Asamoah avgerandi málið, ið sendi Ghana víðari.

Sostatt er Ghana afrikanska vónin í hesari kappingini, og helst munnu flestu afrikanar droyma um, at ghanesisku spælararnir framvegis eru við í kappingini, tá finalan verður spæld í Rustenburg tann 11. juli.

## Perlumál

Í hinari áttandapartsfinaluni vann Uruguay 2-1 á Suðurkorea. Eisini her kom vinnandi liðið á odda eftir fáum minuttum, men í seinna hálvleiki javnleiki fekk Suðurkorea fult uppiborið javnað.

Men so var tað, at Luis Suárez vísti síni bestu kynstur, tá bara 10 minuttir vóru eftir. Við einum framúrskarandi einmansavriki sendi hann bóltin vakurt á stongina og inn, og so var Uruguay komið víðari.

Uruguay, sum vann fyrstu kappingina um heimsmeistaraheitið afturi í 1930, er tí fyri fyrstu ferð síðani 1970 komið í eina HM-fjórðingsfinalu.

hilmarjan@sosialurin.fo


**MÁLPERLA**

*Luis Suárez skrúvaði bóltin í málið til 2-1 ímóti Suðurkorea, og sostatt er minsta suðuramerikanska landið komið í fjórðingsfinaluna, har Ghana verður mótstøðuliðið*

*Mynd: EPA*


**STÓRSMÍLANDI**

*Diego Maradona og Argentina kundu smílast, eftir at Mexiko í gjár varð sent heim úr Suðurafrika við einum 3-1 sigri. So fáa vit at siggja, um hann smílist líka nógv eftir fjórðingsfinaluna ímóti Týsklandi...*

*Mynd: AFP*

# Maradona smílist

**HM2010** Argentina kom víðari við 3-1 sigri á Mexiko, og spurningurin er framvegis, um vit hava sæð tað besta frá argentinum. Eitt nú hevur Messi ikki skotið nakað mál enn

Hilmar Jan Hansen

Diego Maradona hevði alla orsøk til at smílast, tí Argentinga fekk ikki stórvegis trupulleikar í áttandapartsfinaluni ímóti Mexiko. Hóast Mexiko hevði sínar møguleikar, gjørdi Argentina júst tað neyðug fyri at taka seg víðari til fjórðingsfinaluna, sum verður spælt ímóti Týsklandi 3. juli í Cape Town.

Tað var annars Mexiko, ið byrjaði bragdligari, og bara átta minuttir vóru farnir, tá Carlos Salcido úr 35 metrum smekkaði til, so bólturin smeyg sær millum fingrarnar á argentinska málverjanum, Romero, og brast í yvirliggjaran.

Men so kom annað stóra mistakið í døming í gjár, sum altso setti Argentina í gongd miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Carlos Tevez var rangstaddur, tá hann gav bóltinum síðstu nertingina inn um strikuna, men málið varð viðurkent kortini.

## Messi legði upp

Nógv hevur verið sagt og skriva um Lionel Messi, sum skal royna at lyfta tunga arvin eftir Maradona, ið mestsum einsamallur megnaði at vinna Argentina HM-gull. Barcelona-spælarin, sum skoraði 34 landskappingarmál í Spania, eigur framvegis á at skora undir HM-endaspælinum.

Men fyri tað um hann ikki skjýtur málini sjálvur, leggur hann upp til mál hjá hinum. Soleiðis var tað hann, ið fyrst spældi Tevez leysan, tá málið fall, og tá bólturin kom út frá aftur, var tað enn eina ferð Messi, ið sendi hann innaftur til Tevez, sum setti rangstadda krúllin undir bóltin.

Mexikansku spælararnir mótmæltu dúgliga, og tað gekk ein góð løta, áðrenn greitt var, um málið var viðurkent ella ikki. Linjudómarin og dómarin, Robert Rosetti, tosaðu eitt sindur saman, áðrenn Rosettin peikaði á miðjuna og Argentina var á odda 1-0. Og tá Argentina so skoraði til bæði 2-0 og 3-0, var alt avgjørt, og 3-1 málið hjá Mexiko var bara ein lítil uggi áðrenn heimferðina.

hilmarjan@sosialurin.fo